
Veðurtíðindi

Fimmdagaforsøgnin frá DMI


Yvirlit:
Køld luft við kavaælingi rekur komandi dagarnar norðaneftir móti Føroyum, av tí at lufttrýstið framvegis er høgt yvir Grønlandi og lágt yvir meginpartin av Europu.




Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið í Sosialinum



Veðrið í dag:
Upp í frÍskan vind av landnyrðingi, seinni norðri við kavaælingi, men eisini sólglottum. Hitin beint undir frostmarkinum



Lgtrýstið yvir Miðeuropa grynnist. Eitt nýtt lágtrýst sunnan fyri Ísland fer móti bretsku oyggjunum og dýpist



Veðrið mikudagin, hósdagin, friggjadagin og leygardagin:
Frískt lot upp í ein stríkk av norðri og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin um frostmarkið ella eitt sindur undir.




Lágtrýstið yvir bretsku oyggjunum fer í landsynning og lágtrýstið yvir Suðurskandinavia fer í landnyrðing

Vindmegi
Niðanfyri prenta vit heitini fyri vindmegi, máld sum metur/sekund og við Beaufort-skalainum


Beaufort	Vindferð mtr/sek	heiti
0	0,0-0,2	logn
1	0,3-1,5	fleyr
2	1,6-3,3	lot
3	3,4-5,4	gul
4	5,5-7,9	andøvsgul
5	8,0-10,7	stívt andøvsgul
6	10,8-13,8	strúkur vindur
7	13,9-17,1	hvassur vindur
8	17,2-20,7	skrið
9	20,8-24,4	stormur
10	24,5-28,4	hvassur stormur
11	28,5-32,6	kolandi stormur
12	32,7-36,9	ódn

Um dagin 19. november
Elisabeth, deyð 1231. Døttir ungarska kongin Andras. 14 ára gomul varð hon gift týskum greiva, men hann doyði stutt eftir á eini krosferð. Elisabeth gav seg burturav í kirkjuliga tænastu, og fólk tóku til umsorgan hennara fyri sjúkum og fátøkum og teimum, sum ongan góðan høvdu. Í 1229 læt hon byggja sjúkrahús í Marburg fyri tey, sum eingi onnur sjúkrahús vildu vita av.
Varð lýst heilag kvinna í 1235.
Hebráiskt, *Gud er fullkomin*

Kelda: A. Tórgerð, Dage og nøvn i almanakkanum



Avfallið 17. nov.: <0,1 mm. (Avfallið fyrra partin av mánaðinum hava vit ikki fingið enn)



Minsti hiti máldur í november: -7,2° Hægsti hiti máldur í november: 12,2°

Illulisat	-8	Lerwick	2	Moskva	2	Athen	17	Miami	25		
Nuuk	-1	Aberdeen	3	Berlin	4	Malta	21	Los Angeles	15		
Qaqortoq	-3	London	9	Warzawa	7	Tunis	22	Meksikobyur	18		
Ammassalik	-8	Tromsø	0	Kiev	7	Beijing	11	Panama	28		
Saint John's	4	Bergen	2	Bukarest	7	New Dehli	--	La Paz	--		
Halifax	--	Oslo	8	Paris	4	Bangkok	26	Rio de Janeiro	33		
Reykjavík	-5	Stokkhólm	6	Madrid	8	Jakarta	25	Buenos Aires	29		
Seyðisfjørður	-2	Keypmannahavn	6	Róm	17	Sydney	20				
Tórshavn	0	Helsinki	5	Malorca	13	New York	11				

Kelda: DMI

Tiltøk

Meinigheitshúsið, Tórshavn
Týskvøldið 19 .nov. kl. 20: Bibliutími um Fil. 2,1-11 v/ Bodil Tausen.
Hósdagin 21. nov. kl. 15.30-16.30. Gentukórið venur.
Hóskvøldið 21. nov. kl. 20: Ungdómsfundur.
Meinigheitskórið undir leiðslu av Inger Merete Tuxen úr Danmark skipar fyri sangløtu fríggjakvøldið *22. nov. kl. 20.*

KFUK, Tórshavn
Várgleði (barnadeildin) møtir í dag kl. 16.

Samkoman Immanuel
Mikukvøldið møti kl. 20.30.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Týsdagin kl. 17: Club 7 up.

Hoyvíkar Skúli
Sunnudagin kl. 14: sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Harald Haraldsen og Hjalgrím Davidsen. Tórbjørn og Bjarta syngja.
Mánakvøldið kl. 20: Bønarmøti í Oasuni.

Nardussamkoman, Tórshavn
Evangelisk møti er í »Effata«, Íslandsvegur 10, hvønn sunnudag kl. 18.
Hóskvøld kl. 20 er møti í heimunum.

Møtini í Stokkastovuni
Hósdag kl. 17.30: Barnamøti.
Hóskvøld kl. 20: Evangeliskt møti.
Sunnumorgun kl. 10.30: Møti.
Lívsins Orð á Skálafjørðinum

Leirvík
Meinigheitskórið í Havn undir leiðslu av Inger Merete Tuxen úr Danmark hevur sangløtu í missiónshúsinum *hósdagin 21. nov. kl. 19.30.*

Vestmanna
Meinigheitskórið í Havn undir leiðslu av Inger Merete Tuxen úr Danmark hevur sangløtu í kirkjuni *týsdagin 19. nov. kl. 19.30.*

Samkoman Sion, Vágur
Morgunmøti.
Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.
Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.
Hóskvøld kl. 20.30: Bønarfundur.
Forbønartænastan svarar á tlf. 73941 bæði kvøldini meðan bønarfundur er.
Telefonandaktin: 73777.

AA-fundir, Tórshavn
Í kvøld kl. 20 og AA-kvinnufundur kl. 19.30-20.30 (í hølinum hjá Al Anon) í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Losjan í Havn
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Felagið Føroyar-Kuba
Opið er soleiðis í Kongagøtu 11, Tórshavn: Mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 10–12, mikudag kl. 16–18 og leygardag kl. 15–17. Telefon 13016 - Fax 13824.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.
Fríggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur.
Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
kl. 11: Breyðbróting.
kl. 13: Sunnudagsskúli.
kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
2. hóskvøld kl. 19 í hvørjum mánaði eru vit í Hygum.
2. friggjadag í hvørjum mánaði kl. 19.30 eru vit í Esbjerg.
2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 19.30 eru vit í Sønderborg Skolehjem, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti.
Samkoman Malta í Hirtshals

Heimamissiónin
Føroyskt møti verður í **Næstved í »Nain!** Næstved Missionshus, Farimagsgade 30, 4700 Næstved, 22. nov. kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr.
P/f 761, P/f Guttanstøð, 870 Fámjin

Viðtøkur broyttar:
08.09.1996

Nevnd:
Farin úr nevndini: Magnus Jacob Magnussen, 870 Fámjin
Innkomin í nevndina: Arnfinn Petersen, 870 Fámjin

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra, einum nevndarlimi ella av allari nevndini

Skráseting Føroya
tann 8. november 1996
Kristin Balle